Mynd: BP

Uppsagnir á veg á fjórða sinni í ár

Jógvan Hugo Gardar

09.11.2015 - 10:32

Oljan.fo

Veitingarfyritøkan Archer noyðast á fjórða sinni í ár at siga fólk úr starvi. Orsøkin er at minni er at gera í norsku oljuvinnuni, og ætlanir sum skuldu byrja seinni í vetur eru útsettar ella steðgaðar.

Í hesum umfarinum eru tað 115 størv sum hvørva. Í teimum trimum fyrstu uppsagnarumførunum hvurvu ávikavíst 39, 65 og 150 størv.

Sum skilst ynskir Archer at bjóða so nógv sum gjørligt at fara niður í hálva tíð, fyri at tryggja at tey ikki hvørva heilt, tí fyritøkan kemur at hava brúk fyri royndum fólki tá gongd kemur á aftur